


# Jesusbussurin fer av landinum – men kemur aftur

**Brother Clifford, sum koyrir Jesusbussin, fer nú av landinum aftur. Hann hevur verið í Føroyum síðstu tíðina og havt møtir, víst film og prátað við fólk. Maðurin hevur eina keðiliga fortíð, men nú vil hann hyggja frameftir og einans liva fyri Jesusi. Brother Clifford lovar at koma aftur til Føroya næsta ár, og tá ætlar hann sær eisini til Íslands**

JESUSBUSSURIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Síðstu tíðina hevur ein tvíhæddaður bláur bussur koyrt runt landið. Hann er eftirhondini vorðin ein partur av býar/bygdarmyndini hjá nógvum. Á bussinum stendur tekstur. Millum annað ”Vel at fylgja Jesusi”. Hetta hevur fangað forvitnið hjá nógvum, og nógv hava undrast á, hvør eigur hendan bussin.

### Kristin maður

Eigarin og førarin av hesum bussinum, sum helst er fyrsti tvíhæddaði bussur í Føroyum, eitur Clifford Edwards. Hann verður kallaður fyri Brother Clifford, og hann brúkar alla sína tíð til at koyra runt við bussinum og at greiða frá síni trúgv á Jesus. Hann bjóðar øllum inn í bussin til eitt prát, um tey hava hug. Hann hevur eisini havt møtir kring landið, og so hevur hann víst kristiligar filmar á eitt lørift, sum hann hongur upp á síðuna á bussinum. Hann hevur sjálvur kanón, sum varpar myndina á bussin. Síðani hava fólk sitið í bilinum og hugt í besta Drive-In Bio-stíli. Undirtøkan fyri filmssýningunum hevur verið góð. Serliga í Hvalvík komu nógv fólk. Annars hevur hann verið runt allar Føroyar, eisini í Suðuroynni, har ið honum dámdi sera væl.

Summi undrast kanska á, hvussu maðurin kann liva, tá ið hann einans koyrir runt við bussinum og einki arbeiði hevur. Clifford sjálvur sigur, at hann hevur onga einstaka kirkju, sum stuðlar honum við einari fastari upphædd um mánaðin. Hann vísir tó á, at hann hevur nógvar vinir, sum biðja fyri sær.

- Eg liva av pengunum, sum eru í bússuni, sum stendur frammi í bussinum við førarasetrið. Har kunnu fólk koyra eitt oyra í, um tey hava hug. Hvørja ferð eg havi tørv á mati ella diesel til bussin, opni eg bússuna, og tá er altíð nóg mikið til mín tørv. Eg búgvi í bussinum og krevji ikki so nógv, so tær størstu útreiðslurnar fara til diesel, sigur Brother Clifford.

### Fyrrverandi rúsdrekkamisnýtari

Brother Clifford hevur koyrt runt í nógvum londum. Hann er sjálvur breti. Nú er hann ein játtandi kristin, og hann nýtir alla sína tíð til at vitna. Men tað hevur ikki altíð verið so. Í sínum ungu árum var Clifford Edwards yrkissangari. Hann sang á skeinkistøðum og dansistøðum og gjørdist bæði ríkur og kendur. Hann hevði eina frálíka rødd, og hann syngur enn væl. Tað hevur hann víst til summi møti í Føroyum og í sending í Lindini, har ið hann sang ”live”. Clifford drakk nógv og gjørdist so líðandi rúsevnismisnýtari. Hann oyðilegði sítt lív og misti konuna, sum ikki kláraði at liva saman við honum. Clifford misti allar pengarnar, og bjørtu vónirnar um at gerast ein songstjørna fánaðu orsakað av hansara livihátti. Hann livdi síðani í 20 ár sum eitt ólukkudýr í London.

### Skuldi verið deyður fleiri ferðir

Síðani fekk Clifford staðfest krympilivur, og læknin segði, at hann hevði einans nakrar vikur eftir at liva. Hetta var mitt í 90´unum. Men Clifford var tá komin til trúgv á Jesus, og hann greiður frá, at eitt undur gevur honum loyvi til at liva enn í dag. Tá ið hann lá á deyðastrá, lovaði Clifford, at hann skuldi nýta alla sína tíð til at vitna, um hann slapp at liva longri. Seinni fekk Clifford eisini staðfest krabbamein í hálsinum, og tað sæst eisini á síðuni á hálsinum hjá honum. Aftur hesaferð søgdu læknarnir, at hann einans hevði nakrar fáar vikur eftir at liva í. Hetta var í 2001, og Brother Clifford er enn á lívi. Nú er hann farin yvir tey 60 árini.

- Eg livi av náði frá dag til dag, sigur hann.

### Slapp ikki inn í Ísland

Sum sagt hevur Brother Clifford koyrt kring landið og havt møtir. Men nú fer hann av landinum aftur. Steðgurin í Føroyum gjørdist longri enn ætlaður. Hann ætlaði sær til Íslands, og hann fór eisini við Nórrønu til Íslands, men tollararnir vildu ikki lova honum inn í landið, tí at bussurin hjá honum er tveir sentimetrar ov høgur. Tí kom Brother Clifford aftur til Føroya. Nú fer hann so aftur til Bretlands, men hann lovar at koma aftur næsta ár. Til tað tíð fer hann at skifta dekkini á bussinum, so at hann gerst tveir sentimetrar minni, tí at hann vil sleppa til Íslands.

- Íslendingar sleppa ikki undan mær, sigur hann smílandi.

## Brother Clifford í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

JESUSBUSSURIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið skal Brother Clifford hava møti í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Brother Clifford hevur koyrt runt landið og hevur verið stórt sæð allastaðni í Føroyum við sínum tvíhæddaða bussi. Tað sermerkta við bussinum hjá honum er, at tað stendur tekstur á. Har eru bíbliuvers og áheitanir um at fylgja Jesusi. Brother Clifford hevur havt møtir kring landið, og hann hevur eisini víst kristiligar filmar við kanón uppá bussin.

Sunnukvøldið klokkan 18 verður Brother Clifford so í Fuglafirði, har ið hann skal tosa um sína trúgv. Seinni verður eisini filmur vístur.

- Talan er um eitt tvørkirkjuligt tiltak, sum øll eru vælkomin til, siga fyriskipararnir. Siloa og Thabor í Fuglafirði hava avlýst sunnukvøldsmøtini í samband við møti í Mentannarhúsinum.